**Fiskimálaráðið hevur gjørt av at játta pening til 9 nýggjar verkætlanir av játtanini til Fiskivinnuroyndir 2023.**

Hesa ferð komu 19 nýggjar umsóknir inn. Harafturat vóru 5 verkætlanir, sum áður høvdu fingið tilsøgn um framhald eftir 2022. Stýrið fyri Fiskivinnuroyndir hevur viðgjørt umsóknirnar. Umsóknirnar eru viðgjørdar við støði í innkomna tilfarinum eins og endamálsorðingini í stevnuni fyri Fiskivinnuroyndir, sum er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum. Raðfest øki eru royndarveiða og virðisøking av fiski, burðardyggur fiskiskapur, búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum.

Eftir viðgerð í stýrinum var endaliga niðurstøðan at 9 nýggjar verkætlanir skuldu stuðlast og at tær 5 sum áður hava fingið tilsøgn um framhald, verða stuðlaðar.

Tær nýggju verkætlanirnar sum hava fingið játtað stuðul eru vístar í talvuni niðanfyri.

| **Heiti á verkætlan** | **Felag / stovnur** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|
| | | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| LSP | Delta Seafood | 150 | 0 | 0 |
| Innvigingartøl til stovnsmetingar | FISF | 300 | 194 | 0 |
| Hond CTD | Havstovan | 150 | 0 | 0 |
| Tvítroling | JFK Trol | 750 | 0 | 0 |
| Ávaringarskipan móti algum | Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 565 | 0 | 0 |
| Støðan á Føroya Banka | Havstovan | 260 | 40 | 0 |
| Stovnsgull | Fróðskaparsetur Føroya | 200 | 300 | 0 |
| Sjálvvirkandi ílegging í flakamaskinu | Petur Larsen | 300 | 650 | 0 |
| Smart-fisk. Orkuvinarligari fiskiskapur | Sjókovin | 300 | 350 | 300 |

Tær fimm sum fáa játtað framhald eru vístar í talvuni niðanfyri.

| **Heiti á verkætlan** | **Felag / stovnur** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|
| | | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| Taraskógir sum uppvakstrarøki | Havstovan | 250 | 0 | 0 |
| Fiskiskapur eftir reyðæti í Bankarennuni | Mót | 300 | 0 | 0 |
| MSC góðkenning av fleiri fiskasløgum | FISF | 450 | 450 | 0 |
| Alt í land | FJFK trol | 300 | 0 | 0 |
| Reyðsprøka og tunga | Havstovan | 400 | 400 | 0 |